Unglingalandsliðið

Føroyska unglingalandsliðið fór í gjár til Íslands at leika móti íslendska unglingalandsliðnum. Teir skula bert leika ein dyst, sum, um alt gongur eftir ætlan, verður leiktur í kvøld.


16 leikarar eru úttiknir, og hava vit mynd av øllum uttan Dánjal Jarnskorð, NSÍ, Jóannes Jakobsen, HB, og Magna Dybzcak, eisini úr HB.

Tað er Egga Jensen, sum hevur staðið fyri venjingini.


Leikararnir eru annars:




Kristoffur Hansen, HB



Hanus Højgaard, NSÍ




Hákun Djurhuus, HB




Egil Jacobsen, HB



Rógvi Thorsteinsson, TB




Rólant Sørensen, TB




Jóan Petur Clementsen, B71




Tummas Óli Mortensen, HB



Per Strøm, TB




Tummas Pauli Olsen, GÍ



Jógvan Gregersen, GÍ



Hanus Biskupstø, KÍ



Birgir Sondum, HB



Jógvan (Egga) Jensen, venjari

VB var tvær ferð framm-anfyri við tveimum málum

- men landskappingardysturin móti KÍ seinasta sunnudag suðuri á Vági endaði tó við javnleiki

Sjálvt um 1. deildarliðið hjá VB, fekk eina sera góða byrjan í landskappingardystinum móti KÍ seinasta sunnudag suðuri í Vági, eydnaðist tað teimum ikki at vinna dystin, og vóru tað mong, ið aftaná dystin, ið hildu, at um nakar vinnari skuldi verið, so skuldi tað verið KÍ.



um tað reyða kortið, sló Dave tað úr hondunum á honum.

Spennandi

Seinni hálvleikur var væl meira spennandi enn fyrri. Spælið var betur, men liðini vóru tey somu sum í fyrra hálvleiki.

Dysturin

Um sjálvan dystin kann vera ilt at meta, tí vøllurin var so vánaligur. Tað var í heilum, at leikararnir fóru skeivir, tá teir skuldu fáa sær fatur á bóltinum.

Men, hóast alt, so vóru fleiri málmøguleikar frá báðum pørtunum — men mál kom einki.

Tá tjúgu min. vóru loknir av fyrra hálvleiki vóru teir á odda við tveimum málum móti ongum og væntandi var tí at ágangandi álopsspælið fór at halda fram, men so var ikki.

Tvey-máls leiðslu

Líkindini til at spæla fótbólt suðuri í Vági seinata sunnudag vóru ikki av teimum bestu, kalt, illfýsið, regn og eitt fitt lot eftir vøllinum, men hetta sá tó í dystarbyrjanini ikki út til at nerva VB serstakt.

Steðgaði

Tað var eins og spælið hjá vágbingunum steðgaði. KÍ fekk størri og størri lut í leiki og teir málmøguleikarnir, ið VB fekk aftur at hendan hálvleikin, vóru bert tilvildarligir. Tá bólturin kom fram móti brotsteiginum var sjáldan at tað eydnaðist framherjunum, ið jú flest allir eru ungir og kvikir, at skapa veruligar málmøguleikar og tað var ístaðin KÍ, sum í 40. min. fekk bóltin í VB-málið til hálvleiksstøðuna 2—1.

Góðar vónir, men

Vónirnar um at vit hóast vánaligu líkindini skuldu síggja ein hampiligan dyst, vórðu nørdar av VB tá seinni hálvleikur var fýra min. gamal. Tá komu teir nevniliga á odda 3—1 og tá teir nú leiktu undan vindinum, kundi roknast við at bólturin fór at liggja frammanfyri KÍ-málinum størsta partin av hálvleikinum, men hetta vildi KÍ-leikararnir annarleiðis.

Vunnu sær yvirvág

KÍ-leikararnir stríddust væl meira enn VB-leikarnir og vunnu teir sær, sum dystur leið, yvirvág á miðvøllinum og komu fleiri vandamikil álop í lag á VB-málið.

Í 20. og 24. min. góvu tvey av hesum úrslit og var støðan so javnleikur 3—3. At KÍ so lættliga kundi broyta eina tvey-máls leiðslu til javnleik sá út til at skelka VB-verjuna ikki sørt. Hon leikti heldur »ósikkurt« og mangan var tað av hennara ávum, at KÍ fekk vandamiklar málmøguleikar.

Mál — men tað var ikki góðkent

Í 31. min. eydnaðist tað enn einaferð KÍ at fáa bóltin í netið, men hetta mál varð tó ikki góðkent orsakað av at KÍ-framherjin hevði sparkað bóltin úr hondini á VB-málverjanum Mikkjal Mikkelsen.

Eisini VB hevði í seinna hálvleiki einstakar málmøguleikar, men heldur ikki hesir góvu mál so endaliga úrslitið var javnleikur trý—trý og eitt stig í part til liðini, sum nú bæði hava fimm stig.

Ikki av teimum bestu

Dysturin var ikki av teimum best leiktu, men hetta var kanska fyri ein stóran part orsaka av vánaliga veðrinum, men eitt kundu vit áskoðarar tó gleða okkum yvir, nevniliga seks mál í einum dysti og møguleikar til enn fleiri, einahelst til KÍ.

Liðini áttu nærum hvør sín hálvleik, og rættvísasta úrslitið var kanska javnleikur, men aftaná dystin tók ein VB-leikari tó soleiðis til: »Skuldi nakar havt vunnið, so skuldi tað avgjørt verið klaksvíkingarnir.« J.K.





rd.